# Ársfrágreiðing

# 2014

NORÐOYATUNNILIN

**14. apríl 2015**

# Frágreiðing
# til aðalfundin 14. apríl 2015

**(fyri árið 2014)**

## 1. Nevndin og felagið

Á seinasta aðalfundi, 25. mars 2014, vóru allir 3 nevndarlimirnir afturvaldir. Í nevndina vóru afturvald: Jens Kári Vilhelm, Johanna á Bergi og Heri M. Hammer. Nevndin skipaði seg við Jens Kára Vilhelm sum formanni og Hera Hammer sum næstformanni.

Felagið hevur skrivstovu í leigaðum hølum á Hoyvíksvegi 65.

Raksturin er skipaður í samstarvi við P/F Vágatunnilin, sum nýtir somu hølir, útgerð og starvsfólk. Millumroknað verður í mun til nýtsluna hjá hvørjum felagi sær.

Einans nevnd og stjóri eru sett í felagnum. Øll onnur starvsfólk verða nýtt í samstarvi við P/F Vágatunnilin. Allur tekniskur rakstur er lagdur í uttanhýsis rakstraravtalur.

Umsetningurin var í 2014 23,4 mió. kr. og er hetta 1,0 mió. kr. minni enn fíggjarætlanin, sum varð løgd fyri 2014. Av rakstrinum fóru m.a. 3,2 mió. kr. til rakstur av tunli og vegum, 2,5 mió. kr. til innkrevjing og fyrisiting. 0,3 mió. kr. til tryggingar, 2,3 mió. kr. til el, 11,5 mió. kr. til avskrivingar og 2,0 mió. kr. til rentur.

Ársúrslitið gjørdist eitt avlop á 1,2 mió. kr., sum er 1,5 mió. kr. lakari enn árið fyri.

## 2. Virksemið

Endamálið hjá felagnum er smb. viðtøkunum fyri felagið og løgtingslóg um fast samband um Leirvíksfjørð, at útvega fast samband millum Eysturoy og Norðoyggjar, hava rakstur av fasta sambandinum um hendi umframt aðra vinnu, sum hevur samband við hetta virksemið.

Í §1 í løgtingslóg um fast samband um Leirvíksfjørð stendur:

Rættur til tunnilsgerð og eftirlit

§ 1. P/F Norðoyatunnilin, stovnað við heimild í løgtingslóg nr. 168 frá 21. desember 2001 um stovnan av partafelagi at gera fast samband um Leirvíksfjørð, fær rætt til vega- og tunnilsgerð millum Eysturoy og Borðoy og ognarrætt til lidna tunnilin við tilhoyrandi vegi.

*Stk. 2.* Landsverkfrøðingsstovnurin skal undir ábyrgd mótvegis landsstýrismanninum góðkenna tunnilsverkætlanina, herundir vega- og tunnilsgerðina, áðrenn tunnilsarbeiðið verður sett í verk, og skipar í hesum sambandi fyri eftirliti við, at verkætlanin verður framd samsvarandi góðkendu ætlanini. Tá neyðugar forkanningar og prosjektering eru gjørdar og í seinasta lagi 4. apríl 2006, skal landsstýrismaðurin leggja fram uppskot til løgtingslóg um ein tunnil undir ella eina vegføring fram við Leirvík.

*Stk. 3.* Tá útveganarkostnaðurin er fult afturgoldin, og P/F Norðoyatunnilin stendur sum eigari, verður alt anleggið uttan viðurlag avhendað landinum til ognar.

Í høvuðsheitunum hevur arbeiðið fevnt um evnini, ið nærri eru lýst niðanfyri.

## 2.1 Tunnilsarbeiðið

Nógv av vanliga viðlíkahaldinum av tunlinum liggur í føstum skipanum, og tænastusáttmálar eru gjørdir við fleiri fyritøkur um ymiskar tænastur, t.d. viðv. pumpuskipanini, gjaldsstøðini, reingerð av tunlinum, dagligum eftirliti í tunlinum v.m. Føst avtala hevur verið viðvikjandi el-innstallatiónunum, men avtalan er uppsøgd, og alt el-arbeiði verður í dag gjørt sambært rokning.

Ein afturvendandi trupulleiki er, at ymiskt viðvíkjandi el-útgerðini í tunlinum ikki heldur tað livitíð, ið roknast kann við. Hetta gevur nógv eykaarbeiði og nógvar tilkallingar. Til dømis hevur verið neyðugt at skifta allar siktmátararnar, umvæling av elektronikki í bummum v.m.

Á vári 2013 blivu loft og veggir í tunlinum kannað av ingeniørgeologum frá norsku fyritøkuni SWECO. Norðoyatunnilin móttók eftirlitsfrágreiðing frá SWECO í august 2013, har nøkur øki skuldu skrótast og nakað av eyka boltum setast upp til trygging av loftinum. Í januar 2014 bleiv alt trygdararbeiðið, sum varð ávíst í frágreiðingini, framt av fólki frá Landsverki.

SWECO skrásetti eisini 78 støð, har ábøtur eiga at verða gjørdar móti vatnlekum, ið eru niður á vegbreytina. Fleiri støð eru so umfatandi, at hesi støð eiga at verða klødd við **dúki upp** ella klæða økini við PE-skúmi, sum síðan skal sproytast við betongi. Einki er gjørt við hendan trupulleikan í 2014, og er støðan tí óbroytt.

PLC'in, ið stýrir pumpuskipanini, gekk fyri á heysti 2014. Neyðugt var at fáa ein mann úr Norra at skifta PLC'ina.

Gamla telduforritið, sum verður brúkt sum SRO-system (teknisk yvirvaking), og sum er felags fyri Vága- og Norðoyatunnilin, var frá ár 2000. Avgjørt varð at útskifta gamla forritið til eitt nýtt, sum eisini hevur fleiri skrásetingar av driftini í tunlinum, t.d. pumpunum, viftunum, gassi v.m. Tað nýggja forritið

bleiv útviklað av norsku fyritøkuni OneCo, og bleiv sett í rakstur í apríl 2014. Í hesum sambandi blivu allir servararnir eisini útskiftir.

Brimið í Leirvík hevði máað sera nógv niðan undir úttakið, har pumpuleidningurin kemur út, og í 2014 bleiv eitt stórt arbeiði gjørt fyri at tryggja hetta framyvir.
Tað er javnan, at lastbilar koyra við ov høgum lessi ella hava gloymt at leggja kranan niður. Tá ið teir so koyra á hæddarforðingarnar, kann vandi standast av hesum. Nakrar broytingar eru nú gjørdar fyri at minka um trupulleikan.

Radio-útgerðin í tunlinum er gomul, og trupult er at fáa eykalutir til útgerðina. Vit hava kannað fleiri møguleikar fyri at tryggja, at sárbærheitin fyri útfalli ikki er alt ov stór, og avgerð er tí tikin um at seta nakað av eyka útgerð upp í tunlinum. Hendan útgerð gevur okkum samstundis møguleika at hava fleiri útvarpsrásir, t.d. Rás2 og Lindina. Hetta arbeiði verður væntandi liðugt í apríl 2015.

Pumpuverkið í Norðoyatunlinum hevur koyrt gott, burtursæð frá PLC'ini, sí omanfyri. Vatnnøgdin, sum verður pumpað úr tunlinum, er støðug, tó er tað eitt sindur skiftandi í mun til árstíðina. Nøgdin liggur millum 1450 og 1650 tons um samdøgrið.

Frá statusdegnum til í dag eru ikki hendingar, sum vit meta kunnu hava møguliga ávirkan á komandi ársroknskap.

## 2.2 Fígging

Íleggingargrunnurin fyri Føroyar veitir fígging til verkætlanina. Av fíggingini vóru við árslok 2014 37,7 mió. kr. eftir at gjalda niður. Skuldin við árslok 2013 var 48,7 mió. kr. Felagið hevur í 2014 rindað 2,0 mió. kr. í rentu og rindað avdráttir uppá 11,0 mió kr.

Sambært lániskjalinum skuldi restskuldin verið 72,3 mió. kr. Men av tí at felagið hevur havt eitt gott gjaldføri seinnu árini, hevur felagið plaserað peningin á lánið, tí mett er at vit á henda hátt fingu bestu rentuna. Felagið hevur spart áleið kr. 1,3 mió í rentu seinasta árið. Avtalað er við Íleggingargrunnin, at tað sum er goldið útyvir fastløgdu avdráttirnar, kann takast útaftur tá tørvur er á tí.

## 2.3 Ferðsla.

Í dag eru seks av oyggjunum knýttar saman við byrgingum, brúgv og undirsjóvartunlum.Sambært hagtølum frá Hagstovuni, búðu á hesum oyggjum í august 2014 42.273 fólk. Samlaða fólkatalið var 48.599. Sostatt eru 87,0% av íbúgvunum í Føroyum samanbundnir við vegsambandi.

Í talvuni niðanfyri hava vit eisini nevnt ferðafólkatalið, sum fór um flogvøllin. Hesi hava stóran týdning fyri ferðsluna í Vágatunlinum.



Samanbindur 87,0% av íbúgvunum

Fólkatal:

| | |
|---|---|
| Streymoy | 22.755 |
| Eysturoy | 10.762 |
| Vágar | 3.058 |
| Norðoyggjar | 5.698 |
| Í alt | 42.273 |
| | |
| Aðrar oyggjar | 6.326 |
| Íbúgvar íalt nov. 2014[1)] | 48.599 |
| | |
| Ferðafólk um Flogvøllin[2)] | 250.287 |

[1)] www.hagstova.fo
[2)] www.fae.fo

Talva 1

Á myndini niðanfyri sæst, hvussu ferðslan er deild yvir árið, og hvat miðalferðslan hevur verið einstøku mánaðirnar frá 2012 til 2014




| | Jan | Feb | Mar | Apr | Mai | Jun | Jul | Aug | Sep | Okt | Nov | Des |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 2012 | 1.744 | 1.986 | 1.981 | 2.039 | 2.072 | 2.212 | 2.122 | 2.416 | 2.127 | 1.973 | 1.934 | 1.899 |
| 2013 | 1.821 | 1.935 | 1.988 | 2.243 | 2.197 | 2.314 | 2.226 | 2.747 | 2.401 | 2.195 | 1.989 | 1.951 |
| 2014 | 1.944 | 2.111 | 2.227 | 2.205 | 2.493 | 2.422 | 2.318 | 2.818 | 2.446 | 2.304 | 2.295 | 2.136 |

Talva 2. Miðalferðsla pr. dag frá 2012 til 2014

Ferðslan hevur í 2014 verið í miðal 2.310 akfør/samdøgur, í mun til 2.169 akfør/samdøgur í 2013.

Samlaða ferðslan og prosentvísa broytingin síðan tunnilin opnaði, sæst niðanfyri:

| Ár | Akfør | % broyting |
|---|---|---|
| 2006 | 448.884 | |
| 2007 | 662.828 | 47,7% |
| 2008 | 694.398 | 4,8% |
| 2009 | 698.460 | 0,6% |
| 2010 | 707.402 | 1,3% |
| 2011 | 727.316 | 2,8% |
| 2012 | 747.368 | 2,8% |
| 2013 | 791.604 | 5,9% |
| 2014 | 843.645 | 6,6% |

Talva 3: Árlig ferðsla og %broyting í mun til árið fyri. Tunnilin lat upp 26. apríl 2006, tí so stórur vøkstur frá 2006 til 2007.




Talva 4. Tal av akførum, sum hava koyrt gjøgnum tunnilin frá 2006 til 2014.

Tað skal viðmerkjast, at ferðslutølini fyri 2006 eru frá 29. apríl 2006, tá tunnilin opnaði. Sostatt eru 8 mánaðir taldir við í 2006. Tvey tey seinastu árini áðrenn tunnilin lat upp, vórðu um 110.000 akfør flutt um Leirvíksfjørð við ferju.

## 2.4 Nýtslugjald og gjaldstøð

Nýtslugjøldini eru støðugt lækkaði síðan tunnilin varð tikin í nýtslu apríl 2006. Prísurin fyri persónbilar eru lækkaðir við millum 41% og 51%. Prísurin fyri staka koyrin í apríl 2006, tá tunnilin lat upp var kr. Kr. 170,-. Í dag er prísurin kr. 100,-. Prísgongdin, síðan tunnilin varð tikin í nýtslu, sæst á myndunum niðanfyri.




Talva 5. Prísgongdin fyri persónbilar síðan tunnilin lat upp í 2006. Stakprísur lækkaður 41%, kubbahald (20 túrar) lækkað 51%.

Prísurin fyri árshald var tá tunnilin lat upp fyri ferðslu kr. 1.000 um mánaðin. Í desember 2014 var prísurin kr. 700,- um mánaðin.




Talva 6. Avsláttar-/kubbaprísur fyri lastvognar, trailarar og bussar síðan tunnilin lat upp. Prísur yvir 12m lækkaður 75%, >6m <12m lækkaður 63%




Talva 7. Prísgongdin stakar túrar fyri lastvognar, trailarar og bussar síðan tunnilin lat upp. Stakprísur trailarar lækkaður 70% og >6m <12m lækkaður 55%




Talva 9 Miðalgjald pr. akfar í frá 2006 til 2014.

Miðalprísurin, sum hvørt akfar hevur goldið, er broyttur úr kr. 89,60 í 2006 niður í kr. 55,30 í 2014. Miðalprísurin í 2014 svarar til at hvørt akfar skal gjalda kr. 27,65 hvønn vegin.

Á næstu mynd er víst indeks fyri ferðsluna síðan tunnilin lat upp 29. apríl 2006, og hvussu gongdin í miðalgjaldinum fyri hvørt akfar hevur verið (2006 er sett til 100). Ferðslan fyri 2006 er mett ferðsla fyri alt árið, av tí at tey faktisku tølini einans eru fyri gott 8 mánaðir.




Mynd 10. Index fyri umsetning pr. akfar og fyri ferðslu frá 2006 til 2014

Gongdin vísir at samlaða ferðslan er nakað størri í mun til árið fyri, og at tey, ið gera nýtslu av tunlinum, gjalda eitt sindur minni fyri hvønn túrin. Meðan prísurin er lækkaður 42,5% er ferðslan økt við 27%.

Arbeiðið  við at betra innkrevjingina og gera hana meiri smidliga og tíðarhóskandi fyri kundarnar, er nú liðugt. Hetta sæst m.a. á sjálvgreiðsluna á heimasíðu felagsins. Hetta er ein dagføring av verðandi gjaldskipan, sum hevur verið í nýtslu síðan tunnilin lat upp.

Gjaldsskipanin er ein felags skipan við P/F Vágatunnilin, men er soleiðis háttað, at klárt mark er millum fíggjarligu viðurskiftini hjá feløgunum.

## 2.5 Staktúrar/Hald

Á næsttu talvu sæst hvussu teir ymsu akfarsbólkarnir gjalda. Tað eru alt fleiri sum fáa sær hald. Tað eru útvið 90% av teimum sum nýta tunnilin sum hava hald. 26% hava árshald og 58% hald til persónbil og 6% hald til stóran bil yvir 6 metur.




Mynd 11. Vísir hvussu prosentbýtið er millum teir umsu gjaldbólkarnar og hvussu stóran %-part hesir bólkar gjalda

## 2.6 Hvar eru akførini skrásett

Talvan niðanfyri vísir hvar akførin sum nýta Norðoyatunnilin eru skrásett, og hvussu stóran prosentpart hesi gjalda. Dømi: Av teimum sum nýta tunnilin eru 45% skrásett í Norðoyggjum og hesi gjalda 40% av samlaða umsetninginum.




Mynd 12. Vísir í % hvar úr landinum tey sum koyra koma frá, og hvussu stóran procentpart hesi gjalda.

## 2.7 Heilsa, trygd og umhvørvi

Sum partur av støðuga arbeiðinum við at halda trygdina á einum høgum støði, verður tunnilin støðugt kannaður og hevur hetta ført til eitt ávíst viðlíkahaldsarbeiði. Fyri at darva ferðsluna sum minst og fyri

at fasthalda trygdina, er gjørt av, at tá arbeitt verður á vegbreytini verður tunnilin stongdur og arbeitt verður um náttina. Tó verða bilar leiddir gjøgnum tunnilin annanhvønn tíma.

Eitt krav frá myndugleikunum er, at tilbúgvingarætlan fyriliggur. Tilbúgvingarætlanin er gjørd í samstarvi við allar partar sum kunnu hugsast verða ein liður í hjálpararbeiðinum, um óhapp er í tunlinum. Tað verði seg sløkkilið, sjúkrahús, løgregla, Landsverk, Brunaumsjón Landsins o.o.

Stórar venjingar eru 5. hvørt ár seinast í 2013. Smærri venjingar, skipaðar av lokalu brandmyndugleikunum, hava verið í tunlinum í 2014.

## 2.8 Frí ferðsla

Eins og undanfarin ár vóru ársdagarnir, tá ið ávikavist  Vágatunnilin og Norðoyatunnilin lótu upp fyri ferðslu, hátíðarhildnir við  at opið varð uttan at nýtslugjald var kravt. Umframt hetta vóru 2 dagar lagdir í samráð við handilsfelagið í Klaksvík, sum á henda hátt kann nýta høvi at gera vart við seg.

Íalt koyrdu 16.204 teir fýra dagarnar frítt var at koyra í 2014. Tunnilsdagarnir eru vorðnir eitt hugtak og tær afturmeldingar vit fáa eru, at vinnan og áhugabólkar í Norðoyggjum eru  væl nøgd við hesar møguleikar, og verður nakað meira gjørt burturúr at skipað fyri serligum tiltøkum, eins og kunnleikin til tunnilin verður øktur.

## 2.9 Skipan av rakstri

Raksturin hjá felagnum er skipaður við innanhýsis virksemi - sum fevnir um leiðslu felagsins og innkrevjing av nýtslugjaldi, og við uttanhýsis tænastuavtalum, sum fevna um tekniska raksturin av tunlinum og gjaldstøðini.

Avtalað er við P/F Vágatunnilin um felags rakstur, útreiðslurnar verða býttar javnt millum feløgini, tó soleiðis, at serstakar útreiðslur, ið hoyra øðrum felagnum til, verða goldnar av hesum.

# 3. Mál av samfelags- og samfelagsbúskaparligum týdningi

Verkætlanin er løgd í eitt sjálvstøðugt partafelag, ið hevur endaligu fíggjarligu ábyrgdina.

# 4. Rakstrarætlan fyri 2015

Høvuðstølini í rakstrarætlanini fyri 2015 eru víst niðanfyri.

| **Rakstur** | **mió kr** |
|---|---|
| Umsetningur | 24,8 |
| Rakstur tunnil og vegir | -6,3 |
| Rakstur innkrevjing | -2,5 |
| **Úrslit áðrenn avskrivingar og fíggjarpostar** | 16,0 |
| Av og niðurskrivingar tunnilsíløga | -11,3 |
| Fíggjarpostar | -1,8 |
| **Ársúrslit** | 2,9 |
| Av og niðurskrivingar tunnilsíløga | 11,3 |
| Avdráttur | -10,5 |
| **Likviditetsavlop** | 3,7 |

Bert smærri íløgur hava verið í 2014.

Støðisognin er við árslok uml. 288 mió. kr.. Ávísar íløgur skulu væntast í 2015.

# 5. Niðurstøða

Samanumtikið kann staðfestast:

- At úrslitið hjá felagnum gjørdist nakað lakari enn  tað sum varð ásett í ætlanini fyri 2014
- Fleiri fáa sær hald og tí lækka miðalprírirnir
- Prísbygnaðurin er 1. jan 2015 broyttur í mun til Vágatunnilin

Tórshavn 14. apríl 2015

Jens Kári Vilhelm,formaður

Heri M. Hammer, næstformaður

Jóhanna á Bergi, nevndarlimur

/ Uni Danielsen, stjóri

